## Skot í Gula Havinum

Herskip úr Norðurkorea og Suðurkorea skutu eftir hvør øðrum í morgun, og hetta er tann fyrsti samanbresturin av hesum slagnum í sjey ár. Suðurkoreanskar stjórnarkeldur siga, at eitt suðurkoreanskt herskip skeyt eftir einum norðurkoreonskum herskipi, tí tað kom inn um mark, og at hitt skipið svaraði aftur. Sambært keldunum fekk tað norðurkoreanska skipið stóran skaða. Norðurkorea avsanar, at skipið fór um markið og krevur eina umbering úr Suðurkorea. Tað krevur Suðurkorea eisini, skrivar tíðindastovan KCNA.



## Nú er tað Influensa A

Danska heilsustýrið ásannar nú, at ein Influensa A-epidemi er á gáttini, og tí hevur stýrið sagt við læknarnar, at tað er ikki neyðugt at kanna fólk, sum hava Influensa A-sjúkueyðkenni. Else Smith hjá heilsustýrinum sigur við DR, at tá tilburðirnir av Influensa A so nógvir sum nú, má haldast, at tey flestu, sum fáa krím, fáa Influensa A. Else Smith sigur, at krímsjúkan hevur gjørt serliga nógv um seg í Keypmannahavn og har um vegir, men at læknarnir hava eisini staðfest nógvar tilburðir í Mið- og Norðurjyllandi. Statens Serum Institut fer at almannakunngera tey seinastu Influensa A-tølini í morgin.

# Føroyingar garderast við privatari sjúkratrygging

**Hóast samgongan ætlar at skipa eina almenna Heilsutrygd, fara sjúkrakassarnir ikki at geva skarvin yvir. Tvørtur ímóti verður arbeitt við at brúka ognirnar hjá sjúkrakassanum til at gera eina privata sjúkratrygging**

SJÚKRAKASSIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Nú samgongan ætlar at skipa eina almenna Heilsutrygd, hevur ætlanin verið, at teir gomlu sjúkrakassarnir skuldu fara í søguna.

Men tað eru sjúkrakassarnir ikki samdir í, tí teir ætla sær ikki at geva skarvin yvir og leggja seg í grøvina.

Tvørtur ímóti verður nú arbeitt við at umskipa gomlu sjúkrakassarni og gera teir til eina privata sjúkratrygging, sum skal vera afturat almennu Heilsutrygdini, sigur Steinbjørn Magnussen, sum er formaður í sjúkrakassanum á Eiði og nevndarlimur í meginfelagnum fyri sjúkrakassarnar.

### Vandin lúrir

Samgongan ætlar, at í 2010 og í 2011 skulu øll betala 245 krónur um mánaðin í tað almennu heilsutrygdina. Men frá 2012 skal gjaldið takast inn yvir skattin.

Men sjúkrakassarnir hava ikki rættiligt álit á eini slíkari skipan.

- Vit stúra fyri, at verða sjúkrakassanum avtiknir og ein almenn Heilsutrygd sett ístaðin, er stórur vandi fyri, at tann hjálpin, sum sjúklingar fara at fáa, fer at svinga í takt við fíggjarligu støðuna í landinum.

- Vandi er fyri at tilskot verða lækkað og egingjøld hækkað, tá ið tíðirnar versna, sigur Steinbjørn Magnussen.

- Tað eru tær royndirnar vit hava, tá ið ymiskt verður lagt undir tað almenna og endar í stóra potti á fíggjarlógini.

*Føroysku sjúkrakassarnir góðtaka ikki, at tað almenna legur hald á ognirnar hjá sjúkrakassanum, Tvørtur ímóti arbeiða sjúkrakassarnir við at tovna eina privata sjúkratrygging, tí tey hava ikki álit á, at tann almenna Heilsutrygdin verður nóg góð, sigur Steinbjørn Magnussen, formaður í sjúkrakassanum á Eiði og nevndarlimur í meginfelagnum fyri sjúkrakassarnar*

Hann vísir á, at hinvegin hevur skúkrakassin altíð megna at liggja í eini fastari legu, sama, hvussu tíðirnar hava verið.

### Privat sjúkratrygging

Men sum tað sæst í hinari greinini, fara sjúkrakassarnir ikki at góðtaka, at tað almenna leggur hald á ognirnar hjá sjúkrakassanum.

Hinvegin arbeiðir sjúkrakassin nú við at umskipa seg til eina privata sjúkratrygging sum tað skal vera sjálvboðið hjá fólkið at melda seg inn í afturat teirri almennu Heilsutrygdini, sum tað verður eitt krav, at øll skulu gjalda til.

Ætlanin er so at brúka tær 40 milliónirnar, sum sjúkrakassin eigur, sum stovnsfæ í eini slíkari privatari trygging.

Hetta er ein skipan, sum ætlanin nú er at gera í Føroyum við fyrimynd í donsku "Sygesikring Danmark",

- Í Danmark varð staðfest, at tann almenna heilsutrygdin strekti ikki til og tí varð "Sygesikring Danmark" stovnað til at taka um endan og tey hava ein hóp av limum, sum sjálvbodnir tekna seg sum lim.

Nú sjúkrakassin í Føroyum arbeiðir við at stovna eina nýggja trygging, hava tey havt nógv samband við donsku sjúkratryggingina og haðani verður mett, at 40 milliónir hevði verið ein góður botnur til at stovna eina føroyska trygging á, sigur Steinbjørn Magnussen.

# Til reiðar at draga landsstýrið í rættin

**Tað verður ikki uttan svørðslag, at landskassin sleppu at fara avstað við teimum 40 milliónunum, sum Sjúkrakassin eigur, hevur landsstýrismaðurin í heilsumálum púra greitt fingið at vita**

SJÚKRAKASSIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú samgongan ætlar at skipa eina almenna Heilsutrygd ístaðin fyri teir gomlu sjúkrakssarnar, hevur ein stórur spurningur verið, hvat skal henda við øllum ognunum hjá sjúkrakassunum.

Sjúkrakassarnir eiga einar 40 milliónir krónur og Aksel V. Johannesen sigur, at kannað verður nú eftir, hvat skal henda við teimum pengunum.

Men á landsfundinum hjá Javnaðarflokkinum um vikuskiftið fingu bæði Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum, og restin av flokkinum, púra greitt at vita, at sjúkrakassarnir eru ikki sinnaðir at lata landskassan fara avstað við allari puljuni hjá sjúkrakassanum.

- Tað verður ikki uttan svørðslag, at landskassin sleppur at fara við pengunum, gjørdi Steinbjørn Magnussen, púra greitt á landsfundinum.

### Fara í rættin

Hann er formaður í sjúkrakassanum á Eiði og nevndarlimur í Meginfelagnum fyri sjúkrakassarnar.

Og hann gjørdi eisini greitt, at verður tað neyðugt, eru sjúkrakassarnir til reiðar at draga landsstýrið í rættin.

Aksel V. Johannesen hevur nevniliga nevnt møguleikan, at tær 40 milliónirnar hjá Sjúkrakassanum skulu fella til tað almennu Heilsutrygdina.

Men hann vissar um, at peningurin skal ikki brúkast til rakstur, men setast í ein heilsugrunn, sum skal stuðla heilsufremjandi tiltøkum, eitt nú gransking.

Men hesum er sjúkrakassin als ikki samdur í og ætlar at stríðast ímóti.

Steinbjørn Magnussen vísir á, at tað er altso sjúkrakassin, sum eigur pengarnar.

- Og leggur tað almenna hald á teir, er talan um einki minni enn ognartøku og tað fara vit ikki at góðtaka, tí tað kunnu vit ikki góðtaka, staðfestir Steinbjørn Magnussen.

Sum tað sæst í hinari greinini her á síðuni, arbeiðir sjúkrakassin við at eini ætlan, har tær 40 milliónirnar skulu brúkast til eina privata sjúkratrygging, sum skal koma afturat teirri almennu Heilsutrygdini, sum øll skulu vera í.

### FAKTA

Hvussu verður við ognunum hjá sjúkakassunum, er ein løgfrøðiligur spurningur, sum verður viðgjørdur í løtuni. Um ognirnar hjá sjúkakassunum fella til Heilsutrygd, so fer landsstýrismaðurin at tryggja, at pengarnir ikki verða brúktir til vanligan rakstur. Umhugsað verður at gera ein heilsugrunn, sum skal veita stuðul til átøk, ið hava til endamáls at menna heilsuna hjá føroyingum, m.a. heilsugransking.

**Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í tíðindaskrivi um ognirnar hjá sjúkrakassanum eftir at almenna heilsutrygdin er stovnað**